# Keypmannahavn kosin heimsins besti býur

FERÐAVINNA
www.bl.fo

Í øllum førum, um vit skulu trúgva enska vikublaðnum Monocle, sum í næstu viku kjósar 25 av heimsins bestu býum. Enska vikublaðið er hugtikið av teimum mongu, vøkru íbúgvunum, ið súkkla runt í gøtunum í Keypmannahavn.

Keypmannahavn vinnur í harðari kapping við Stockholm München, Barcelona og Honolulu.

Dómaraliðið hjá Monocle hevur raðfest 25 býir við at samanbera teir á nógvum ymiskum økjum. Her er talan um livikostnað, skúlaskipan, sjúkrahúsverk, men dómararnir hava eisini tikið lívsstíl, formlist og mentan og so framvegis við í sínar metingar.

Monocle er hugtikið av Keypmannahavn og serstakliga formlist, sniðgeving og byggilist, og ikki minst av mongu grønu økjunum, ið finnast í býnum.

Tær mongu 5-stjørnaðu mat- og kaffistovurnar gera saman við øllum teimum mongu, glaðu súkkandi fólkunum, býin til eitt ótrúliga gott upplivilsi, verður m. a. sagt í dómarametingini.

Heimins 20 bestu býir sambært Monocle er:

1. Keypmannahavn
2. München
3. Tokyo
4. Zürich
5. Helsingfors
6. Wien
7. Stockholm
8. Vancouver
9. Melbourne
10. Paris
11. Sydney
12. Honolulu
13. Madrid
14. Berlin
15. Barcelona
16. Montréal
17. Fukuoka
18. Amsterdam
19. Minneapolis
20. Kyoto



*Rundatorn í Keypmannahavn, sum Kristian fjórði kongur bygdi, er eitt av sereyðkennunum fyri danska høvuðsstaðin*


STARVSFÓLK TIL SBW Í TÓRSHAVN



– Ert tú ein liðleikari?
– Vilt tú vera við til at skapa framburð og góð úrslit?
– Dugir tú at skapa íblástur og trivna saman við starvsfelagunum?

SØLUFÓLK

Søkt verður eftir sølufólki til innflutningsdeildina. Á deildini arbeiða 3 fólk og verður tú ein partur av hesum toymi.

Viðkomandi skal hava:
– royndir innan sølu
– góð samstarvsevni
– teldukunnleika á brúkarastøði

Løn sambært avtalu.

Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til John Frandsen, á 23 96 18 ella johnf@sbwcargo.com

Umsóknir skulu verða okkum í hendi 18. juni 2008. Umsóknin skal sendast:

SMYRIL BLUE WATER
Postsmoga 3296
FO-110 Tórshavn
Att.: John Frandsen

Smyril Blue Water bleiv í 2005 stovnað sum eitt joint venture ímillum Smyril Line og Blue Water. Felagið hevur høvuðssæti í Tórshavn. Umfram skrivstovuna í Tórshavn, hevur felagið skrivstovu í Hanstholm og á Seyðisfirði.

SMYRIL BLUE WATER · POSTMOGA 3296 · FO-110 TÓRSHAVN

